# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Temakvøld um ung foreldur



Mikukvøldið 23. mai kl. 20 verður temakvøld um ung foreldur.

Kvinnur, ið eru blivnar mammur í sera ungum aldri, koma at hugleiða um tað at vera ung foreldur.

Heilsufrøðingurin Jóngerð Poulsen kemur eisini at greiða frá hennara møti við ung foreldur.

Tónleikur og kaffi við onkrum góðum afturvið verður eisini á skránni.

Margarinfabrikkin skipar fyri hesum tiltaki, sum hevur til endamáls at varpa ljós á ymisk viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri ung.

Temakvøldið er ókeypis og er ætlað teimum ungu og øðrum áhugaðum.

## Eyðun aftur á popptindinum

Hóast Eyðun Nolsøe er um tey 40 og ikki longur er tann ungi sprelski provokatørurin, ið dansaði runt á springvatninum í Miðbýnum í Havn og sang um "Tey stressaðu", so hevur hann enn fatur á ungu lurtarunum.

Nýggja fløgan hjá Eyðun, so nógvar røddir, hevur fingið sera góða móttøku, ummælarin hjá Sosialinum gav fløguni avbera gott ummæli, og lagið Hvønn dag hevur verið nógv spælt í útvarpinum, og hevur seinastu vikurnar avbjóða í toppinum á 15 teimum bestu. Men hesa vikuna hevur Eyðun munin, og er farin framum øll onnur. Tað er í stóran mun ung fólk, ið vitja heimasíðuna hjá 15 teimum bestu, og eftir øllum at døma er Eyðun nakað fyri tey.

**nud**



## Showmenn siga REX farvæl

**Fá dansistøð munnu hava lagt pall til Showmenn so ofta, sum REX hevur. Tí verður tað ivaleyst við sorgblídni, at Føroya besti dansibólkur fer á pall í dansistaðnum allar seinastu ferð.**

**ÁTÓNLEIKUR**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tað hevur longu verið greitt í eina tíð, at Showmenn í summar gevast við at spæla, og nú nærkast endin. Hetta vikuskiftið fer bólkurin á pall í REX. Teir spæla bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Leygarkvøldið verður gjørt eitt sindur serligt burturúr og REX bjóðar sjampanju til gestirnar.

Hóast teir fýra, ið mannað Showmenn, ikki fara at spæla saman longur, so fara teir ikki at gevast við at spæla tónleik. Herfyri spældi Jens Marni tildømis í REX við eini nýggjari trio, ið umfram hann taldi upprunaliga bassleikaran í Showmonnum, Paula Magnussen og trummuleikaran Henning Nicodemussen, ið spældi saman við Jens Marna í Kjølum og All That Rain.

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




## Marknaðarfólk

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álitandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann, vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Tín høvuðsuppgáva verður dagliga framleiðslan av blaðnum, í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Gudny Langgaard á tlf. 341823. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á gudny@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.
Umsóknarfreistin er týsdagin 29. mai,
og skal umsóknin, saman við viðkomandi skjølum, sendast til:

**Sosialurin**
**Marknaðardeildin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*

## Tangabilførari í Tórshavn

**Søkt verður eftir tangabilførara til ein av okkara tangabilum í Tórshavn.**

**Starvið**
Starvið er at veita kundum okkara tænastu á hægsta stigi.

**Arbeiðið umfatar:**
- Í fyrsta lagi koyring í Tórshavn.
- Í øðrum lagi koyring á meginøkinum.
- Í triðja lagi annað arbeiðið í samband við oljuúrdráttir.

**Vit bjóða**
Eitt støðugt arbeiðið, har persónurin kemur at vera ein partur av verandi arbeiðstoymi hjá Statoil í Tórshavn og aðrastaðni runt landi. Starvsfelagin vit leita eftir, skal verða ágrýtin, kunna arbeiða sjálvstøðugt og seta kundans tørv í fyrstu røð.

**Førleiki**
Tað er ein treyt, at tú hevur tað stóra koyrikortið og at tú hevur royndir at koyra stórar bilar.

Latin verður mánaðarløn samb. galdandi sáttmála.

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Magna Dybczak rakstrarleiðara, ella Andrias Mikkelsen goymsluleiðara á tlf. 343500

Skrivlig umsøkn verður at senda til:

**P/F Statoil Føroyar**
Rakstrardeildin
Vestara bryggja 2
Postboks 3098
FO 110 Tórshavn

innan 25 mai 2007.

Endamálið hjá Statoil Føroyum er at veita brúkarum í Føroyum oljuúrdráttir og aðrar vørur. Hjá Statoil arbeiða um 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av fremstu málum okkara.

STATOIL